# Ungverskur unglingi við Margáir

EB/Streymur tykist halda fram við at styrkja sær um spælarahópin. Í løtuni er ein 18 ára gamal ungverji og venur við felagsliðnum, sum aftur í ár meddar eftir toppinum. Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, sigur, at talan er um áleypara, sum seinast hevur spælt í næstbestu deildini í Eysturríki. – Hann hevur sýnt áhuga at koma hendavegin, og vit vænta okkum sjálvandi nakað av honum. Enn er tó eingin sáttmáli skrivaður, men nú venur hann so við liðnum í tvær vikur, og so verður støða tikin til tann partin.

# Overgaard leingir við AB

AB hevur á heimasíðu sínari boðað frá, at felagið hevur longt sáttmálan við Morten Overgaard, sum í fjør var ein av grundstuðlunum í verjupartinum. Hóast AB flutti niður, so var lítil ivi um, at danski verjuleikarin væl og virðiliga hevur støði til Formula-bólt, og tí eru tey á Argjum sjálvandi fegin um, at nýggjur sáttmáli er komin upp á pláss.

StÍF-Kyndil 39-29 (15-17):

# Áttanda finalan á rað

**Steypaliðið fram um øll hini er aftur í ár partur av mansfinaluni í hondbólti**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Níggju av seinastu tíggju ferðunum hevur StÍF verið partur av mansfinaluni í hondbólti. Av teimum níggju eru sjey endaðar við sigri til StÍF, og tí er eingin ivi um, at strandingar aftur í ár hava góðar vónir um, at teir skulu lyfta steypinum enn einaferð.

## Settu ferðina upp

Fortreytirnar eru í øllum førum til staðar, eftir at StÍF vann tryggan sigur á veteranunum hjá Kyndli í hálvfinaluni. Fyrra dystin vann StÍF 37-15, og við sigrinum í gjár gjørdist samlaða úrslitið 76-44.

Í gjár hekk Kyndil við eina løtu. Fyri steðgin var ikki tann heilt stóri munurin á liðunum báðum, men tá ungu og topptrimmaðu strandingarnir settu ferðina upp eftir steðgin, beyð ikki bøtur, tá væntaði sigurin varð spældur heim.

## Vandi í vælferðini

Og lítil ivi er um, at strandingar eisini eru favorittar í finaluni. Líka mikið um mótstøðuliðið eitur Kyndil ella H71.

Einasti vandi í vælferðini man vera, at StÍF eisini er somikið væl við í landskappingini. Hóast StÍF tey nógvu seinastu árini hevur havt ein stóran leiklut í toppinum av føroyskum hondbólti, so er greipan ikki vunnin hesi árini kortini. Teir vórðu annars meistarar í bæði 1999 og í 2004. Men júst tey bæði árini taptu teir eisini steypafinaluna. Seinnu ferðina enntá móti Kyndli, sum væl kann hugsast at verða mótstøðuliðið hesaferð.

## FAKTA

**Kyndil II-StÍF 29-39 (15-17)**
**StÍF víðari við 44-76**
10 min: 5-5
20 min: 7-11
40 min: 17-16
50 min: 21-30
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Rúni Johansen 10(1), Jónleif Sólsker 9(1), Brian Poulsen 4, Uni Wardum 3(1), Hannis Wardum 2, Kári R. Nielsen 1
**StÍF:** Bárður Danielsen 7, David Edvardsen 7(1), Rúni Niclasen 5, Jón Rasmussen 5, André F. Danielsen 4, Borgar Danielsen 2
**Brotskøst:** Kyndil 4, StÍF 1
**Útvísingar:** Kyndil 2, StÍF 1
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg

# Enn trý Pál-met



*Pál Joensen setir nú eisini met á styttru crawl-teinunum. Um vikuskiftið tók hann 100 metra metið hjá Kristiani Olsen*

**Pál Joensen kutaði um vikuskiftið 19/100 sekund av føroyska metinum á 100 metra frí. Eisini setti hann met í 100 og 400 metra blandaðari svimjing**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Svimjikapping var í Havn um vikuskiftið, og vóru tað hesaferð svimjarar úr bólki 3 og eldri, ið royndu seg.

Aftur hesaferð gjørdist SuSvim vinnari av kappingini við 30 gull-, 15 silvur-, og 12 bronsuheiðursmerkjum.

Pál Joensen er glóðheitasta navnið í føroyskari svimjing í løtuni, og aftur hesa ferð skarvaði hann av metunum. Hesa ferð gjørdist talan um trý av slagnum. Á 100 metra blandaða teininum svam hann heim í 1.00,80, og er tað 37/100 sekund betri enn gamla metið, sum Beinir E. Danielsen úr Flot átti.

Í 100 metra frí gjørdist talan um nýtt met við 0.52,30, sum eru 19/100 sekund betri enn gamla metið hjá Kristiani Olsen. Og í 400 metra blandaðari svimjing gjørdist talan eisini um met. Hesa ferð við tíðini, 4.34,41.

## FAKTA

**Heiðursmerkjabýtið**

| Felag | gull | silvur | bronsa |
|---|---|---|---|
| SuSvim | 30 | 15 | 12 |
| Fuglafj. Svimjifelag | 26 | 10 | 7 |
| Havnar Svimjifelag | 21 | 19 | 12 |
| Ægir | 18 | 25 | 14 |
| Reki | 7 | 7 | 8 |
| Flot | 6 | 5 | 2 |

**Topp 10 Fina stig í 25m hyli**

| | Navn | Ár | Felag | Stað | Grein | Tíð | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Pál Joensen | 90 | SuSvim | HS. Jan 08 | 400m frí | 03.56.73 | 793 |
| 2 | Kári J. á Høvdanum | 90 | Ægir | HS. Jan 08 | 100m rygg | 00.57.66 | 698 |
| 3 | Shaila M. Garðarnar | 84 | SuSvim | HS. Jan 08 | 50m frí | 00.27.31 | 695 |
| 4 | Pauli Ø. Mohr | 91 | FS | HS. Jan 08 | 50m frí | 00.24.08 | 690 |
| 5 | Mona Simonsen | 91 | SuSvim | HS. Jan 08 | 400m frí | 04.33.58 | 686 |
| 6 | Danjal M. Hoffgaard | 89 | SuSvim | HS. Jan 08 | 100m frí | 00.54.36 | 638 |
| 7 | Dánjal Hestoy | 90 | HS | HS. Jan 08 | 50m frí | 00.25.20 | 602 |
| 8 | Helena Sævarsdóttir | 94 | SuSvim | HS. Jan 08 | 50m frí | 00.28.71 | 598 |
| 9 | Karina Petersaen | 80 | FS | HS. Jan 08 | 50m bringa | 00.36.00 | 594 |
| 10 | Bjørg Seloy | 92 | HS | HS. Jan 08 | 200m frí | 02.17.48 | 586 |
| 10 | Malan V. Bærendsen | 91 | SuSvim | HS. Jan 08 | 200m bringa | 02.47.68 | 586 |

# Seinastu finalistarnir skulu finnast

**Spenningur verður stórur á Hálsi, har kvinnurnar hjá Kyndli og Tjaldri skulu gera av, hvør teirra fær óvæntaða finalumøguleikan**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hevði onkur undan kappingarbyrjan sagt, at Tjaldur ella Kyndil skuldu verða annar parturin í steypafinaluni hjá kvinnum, so høvdu tey flestu helst bara ypt øksl.

Men veruleikin er nú, at annað av liðunum fær møguleikan. Kyndil hevur ikki verið í finaluni, síðani tær í 2000 vunnu eina óhugnaliga spennandi finalu á VB, men tað krevur nakað, um Kyndil skal somikið langt í ár.

Tjaldur hevur nevnliga gjørt púrasta greitt, at tað var álvari handan orðini, tá tey í summar søgdu, at liðið – umframt uppflyting til Sunset-deildina – eisini ætlaði sær langt í steypakappingini. Fyrru hálvfinaluna móti Kyndli vann Tjaldur við fýra málum, og tí hava tær nú góðar fortreytir at spæla seg fram til størsta hondbóltsdagin av øllum.

Í hini hálvfinaluni hjá kvinnum er so sum so við spenninginum. Stjørnan gjørdi nevnliga bart, tá tær vitjaðu í Vág i, og ilt er at síggja, hvussu tær skulu missa seks mála stóra leiðslu á heimavølli.

Seinasta finalan í kvøld verður hjá monnum. Her hevur Kyndil betru kortini í dystinum móti H71. Fyrra dystin, sum varð spældur í Hoyvíkarhøllini, vann Kyndil við seks málum. Og tað er ein leiðsla, sum eigur at geva teimum grønu stóran fyrimun undan dystinum í kvøld.

## FAKTA

**Dystirnir í kvøld**

**Kvinnur**

| Dystur | Klokkan | støðan |
|---|---|---|
| Kyndil-Tjaldur | 18.30 | 28-32 |
| Stjørnan-VB | 19.00 | 28-22 |

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| Kyndil-H71 | 20.00 | 28-22 |